


# Hava leigað summarhús út í halva øld









**DanCenter hava sera nógvar royndir, tá tað kemur til leiga summarhús út kring alt Danmark**

Ferðamynstrið og feriumynstrið broyttist nógv fyri góðari hálvari øld síðani. Høvuðsorsøkin var ikki minst, at tað gjørdist meiri vanligt, at vanlig fólk ognaðu sær ein bil. Sama mynstrið var galdandi fyri stóra grannalandið, sunnanfyri Danmark, Týskland. Týskar familjur ynsktu at gagnnýta tað stóra mobila frælsið, sum bilurin gav teimum. Stóru strendurnar í Danmark drógu nógvar týskarar, og miðskeiðis í 1950-unum vóru nógvir fyrispurningar frá týskarum, um at sleppa at leiga donsk frítíðarhús.

**Fyrsta útleigingarfelagið í Danmark**

Við tíðini fekk danska ferðaráðið so nógvar fyrispurningar frá týskarum, at tey snøgt sagt ikki megnaðu at svara øllum fyrispurningunum. Hetta slóðaði gøtuna fyri trý fólk innan danskan ferðaídnaðin, sum settu á stovn fyritøkuna »Dansk Centralkontor for Sommerhus-udlejning«. Fyrsta fyritøkan av hesum slagi í Danmark, var ein veruleiki. Tey fyrstu árini samstarvi fyritøkan við nógvar ferðamannaskrivstovur, men sum eftirspurningurin øktist, og fleiri og fleiri frítíðarhús vóru útleigaði, vaks tørvurin á einum meiri professionelum felagsskapi. Í 1971 var tann 26 ára gamli, Kurt Holmsted settur sum stjóri. 15 ár seinni – í 1986 – hevði Kurt Holmsted keypt fyritøkuna, samstundis broytti fyritøkan navn til »DanCenter AS«. At vera frítíðarhúsaveitari merkir, at ein vil skapa samband við tey, sum vilja leiga út frítíðarhús hjá teimum, sum tey hava samstarv við, til tey sum hava áhuga at leiga hetta frítíðarhúsið. Ella sagt við øðrum orðum: DanCenter eigur ikki nakað av frítíðarhúsunum. Ekspertisan hjá DanCenter liggur ikki í at byggja ella at eiga ognir, men at leiga tær út fyri áhugaðar frítíðarhúsaeigarar, til áhugaðar feriugestir.

**12.000 frítíðarhúsa**

Og tað er ikki smávegis tal av frítíðarhúsum, sum DanCenter hevur á veitingarlistanum. Á listanum hjá DanCenter eru nú 12.000 frítíðarhús, og tað krevur sjálvsagt eitt sterkt arbeiðslið, sum hevur kompetansu, góð samsarvsevni, og sum skilur, at ein krevur at fara væl um frítíðarhús. Tí hevur DanCenter 60 starvsfólk á høvuðsskrivstovuni, og 100 starvsfólk kring Danmark, sum arbeiða á lokalum skrivstovum og sølufyritøkum. DanCenter hevur javnt og samt eina útbúgvingarverkætlan fyri starvsfólkunum, so tey kunnu betra seg á øllum teimum økjunum, sum hava týdning fyri kundarnar hjá DanCenter. Og á DanCenter halda tey seg vita, hvat kundarnir halda av týdningi, tí á DanCenter gera tey nógv burturúr at spyrja kundarnar. Ígjøgnum samskiftið við kundarnar, skilja partarnir – veitarin og kundin – hvønn annan, og samstarvið er tryggjað. DanCenter metir seg eisini hava eina breiða viftu av summarhúsum, sum kunnu nøkta tørvin hjá føroyingum, sum vilja leiga sær eini frítíðarhús í Danmark. Á www.dancenter.dk ber til at leita fram frítíðarhúsi, sum kann gerast dreymahúsið á einari dreymaferð í Danmark.

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*